# Haru-skjóting onga av-marking




**Tað tykist vera ivi um, hvussu nógv skot harumenn kunnu hava í byrsuni, men av politistøðini verður sligið fast, at einki mark er fyri tali av skotum í byrsuni til haruveiði**

Leo Poulsen

Nú vit eru komin eina viku inn í harutíðina, tekur kjakið seg aftur upp, um hvussu nógv skot tú kanst hava í byrsuni, tá tú skjýtur harur.

Verður hugt at løgtingslóg um haruveiði stendur: »Haruveiða má bert fara fram í dagsljósi gerandisdagar, og loyvi er bert at nýta høglbyrsu«.

Tað skuldi verið nóg greitt, men hyggja vit í løgtingslóg um fuglaveiði standur soleiðis: »...Tað er ikki loyvt at veiða við byrsu, sum hevur meira enn 2 skot«.

Tað er hetta, sum hevur ført til, at menn eru eitt sindur í iva um hvat er tað rætta. Ført verður tíðum fram, at tú bert kann keypa byrsur, ið hava tvey skot. Men tað eru tær sonevndu pump-gun og hálvautomatiskar byrsur, sum bert taka tvey skot, men við at taka eina plombu úr kanst tú løða við fimm skotum.

Hetta er kortini ikki heilt beint, tí tú fær eisini byrsur, sum onga plombu hava, og sum tískil kunnu løða fimm skot.

Vit hava vent okkum til politistøðina í Havn og tosað við Tønnis Wardum, og hann sigur, at avmarkingin er bert á fuglaveiðini.

- Vit hava tosað um hetta okkara millum, eisini við løgfrøðingarnar á støðini, og semja er um, at vit eiga at tulka lógina soleiðis, sum hon er skrivað. Tað merkir í stuttum, at á sjógvi kanst tú ikki brúka byrsu við fleiri enn tveimum skotum, meðan tú á landi onga avmarking hevur, sigur Tønnis Wardum.

Tað merkir so aftur, at pump-guns og hálvautomatiskar byrsur eru púra lógligar til haruveiði, meðan tær ikki eru lógligar til fuglaveiði.

Tað er tí misvísandi, tá tað inni á heimasíðuni hjá løgregluni, http://www.politi.dk/Faeroerne/fo/loveogbestemmelser/Harejagt stendur: »Haruveiða er einans loyvd í dagslýsi gerandisdagar. Loyvt er bert at nýta høglbyrsu, ið kann løðast við í mesta lagi 2 patrónum«.

**Selma Poulsen**
**Tvøroyri**

andaðist leygardagin á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, 84 ára gomul.

Kistan fer úr kappellinum týsdagin kl. 17.30 í kirkjuna. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju mikudagin kl. 12.30.

Tey, ið vilja minnast Selmu við blómum ella kransi, kunnu lata ein gávu til Tvøroyrar kirkju, konta í Bank Nordik.

## J-dagurin gav løgregluni eitt strævið vikuskifti

**Fríggjadagin dagurin var tað, tey nevna J-dagur og tað setti síni týðiligu spor hjá teimum løgreglufólkum, sum hava havt vakt um vikuskiftið**

Áki Bertholdsen

Fyri teimum óvitandi kann verða upplýst, at J-dagurin er dagurin, tá ið jólaølið kemur á marknaðin og tað verður altíð feirað.

Hetta hevur givið løgregluni eitt serstakliga strævið vikuskiftið, tí tað hevur at kalla ikki verið friður.

Í hesum sambandi var løgreglan boðsend óteljandi ferðir at loysa ymsar trupulleikar, bæði úti á alfaravegi, í vertshúsum og heima hjá fólki.

Næstan hvørja einastu ferð var rúsdrekka uppi í og tað elvdi til, at kegl og at ósemjur stungu seg upp og ikki so sjáldan vóru fólk bara blivin so ómøgulig, at tey flættaðust ikki við og so vórðu boð send eftir løgregluni at fáa skil á aftur.

Onkur smávegis herverk vóru eisini.

Men løgreglan sigur, at talan var bara um smáttarí og at tað ongantíð var nakað serligt á vási.

Men tvær ferðir kom løgreglan fram á rúsevni. Ta einu ferðina hevði ein maður ein posa uppi á sær við sporum av hvítum pulvuri í og kanningar vístu, at talan var um ecstasy. Ein annar maður hevði 1,2 gramm av skunk uppi á sær og teir báðir verða so ákærdir fyri tað.




*Tá ølið fer inn... Løgreglan hevði úr at gera*